Eysturkommuna

Mál til viðgerðar: 25/00464 Broyting av býarplani við Gøtugjógv matr.nr. 2

Málsviðgeri: Unn Sørinardóttir Perdomo

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 22.10.2025 | 30/25 | 25/00464-1 |
| 2 Býráðið | 30.10.2025 | 56/25 | 25/00464-1 |

# BROYTING AV BÝARPLANI VIÐ GØTUGJÓGV MATR.NR. 2

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur ætlanir, um at broyta býarætlanina fyri part av matr. nr. 2 við Gøtugjógv, sum í løtuni er skrásett sum øki H – Frílendi, við tí endamáli at broyta hetta til øki B – Bústaðarøki.<br><br>Upprunin til málið, er at tað kann verða trupult at skaffa lendi til bústað við Gøtugjógv.<br>Kommunan metir, at nevndi partur av matr. nr. 2 er væl egnaður til bústaðarendamál. Í býarskipanarligum høpi er økið somuleiðis væl egna at nýta til bústaðir, tí bæði vegur, kloakk o.a. longu eru løgd fram til hetta økið við Gøtugjógv.<br><br>Hendan broyting er ein liður í ætlan kommununnar um at tryggja møguleikan fyri fleiri bústaðum í Gøtugjógv.<br><br>Broytingarnar fevna um:<br>At broyta ein part av matr. nr. 2 frá H - Frílendi til B - Bústaðarøki.<br><br>Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 15.000,- kr. |

| Tilmæli |
| --- |
| Umsitingin mælir til, at gera hesar broytingarnar í býarplaninum við Gøtugjógv. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 22. oktober 2025**
Byggi- og býarsikipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 30. oktober 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.